


# ÁRS- OG KONSERNFRÁSØGN

## 2014

**FRUMRIT**

Árs- og konsernfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann 29. apríl 2015

fundarstjóri

V-tal: 566.713 \ K.nr. 14577

P/F-skrás.nr. 4800

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| Høvuðs- og lyklatøl fyri konsernina | 5 |
| Høvuðs- og lyklatøl fyri móðurfelagið | 6 |
| Leiðslufrágreiðing | 7 |
| **Árs- og konsernroknskapur 1. januar - 31. desember 2014** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 16 |
| Rakstrarroknskapur | 24 |
| Fíggjarstøða | 25 |
| Pengastreymsuppgerð | 27 |
| Notur | 28 |

## Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram árs- og konsernfrásøgnina fyri 2014 hjá P/F Vága Floghavn.

Árs- og konsernfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at árs- og konsernfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2014 og av úrslitinum av virksemi og pengastreymi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Árs- og konsernfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Sørvágur, tann 17. apríl 2015

**Stjórn**

Jákup Sverri Fonsdal Kass
stjóri

**Nevnd**

Kitty May Ellefsen
nevndarformaður

Evy Jacobina Jacobsen
næstformaður

Jóhan Leivur Olsen í Niðristovu
nevndarlimur

Uni Danielsen
nevndarlimur

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til kapitaleigararnar í P/F Vága Floghavn**

**Átekning á árs- og konsernroknskapin**

Vit hava grannskoðað árs- og konsernroknskapin hjá P/F Vága Floghavn fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2014 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, pengastreymsuppgerð og notum fyri bæði konsernina og móðurfelagið. Árs- og konsernroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

**Ábyrgd leiðslunnar av árs- og konsernroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera árs- og konsernroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ein árs- og konsernroknskap kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um árs- og konsernroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í árs- og konsernroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í árs- og konsernroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í árs- og konsernroknskapinum uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein árs- og konsernroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu árs- og konsernroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at árs- og konsernroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2014 og av úrslitinum av virksemi og pengastreymi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2014 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Vit hava, sambært ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað sum ískoyti til grannskoðanina av árs- og konsernroknskapinum. Útfrá hesum grundarlagi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við árs- og konsernroknskapin.

Tórshavn, tann 17. apríl 2015

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Joensen
løggildur grannskoðari

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | P/F Vága Floghavn<br>FO-380 Sørvágur | |
| | Telefon: | 354400 |
| | Telefaks: | 354401 |
| | Heimasíða: | www.fae.fo |
| | P/F-skrás.nr.: | 4800 |
| | V-tal: | 566.713 |
| | Stovnað: | 14. juni 2007 |
| | Heimstaður: | Sørvágur |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. desember |

**Nevnd**

Kitty May Ellefsen, nevndarformaður
Evy Jacobina Jacobsen, næstformaður
Jóhan Leivur Olsen í Niðristovu, nevndarlimur
Uni Danielsen, nevndarlimur

**Stjórn**

Jákup Sverri Fonsdal Kass, stjóri

**Grannskoðan**

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki
Hoyvíksvegur 5, Postboks 30, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01
Teldupostur: januar@januar.fo
Heimasíða: www.januar.fo

**Dótturfelag**

P/F Duty Free, Sørvágur

## Høvuðs- og lyklatøl fyri konsernina

| | 2014<br>t.kr. |
|---|---|
| **Rakstrarroknskapur:** | |
| Bruttoúrslit | 35.099 |
| Rakstrarúrslit | 3.181 |
| Fíggjarligir postar, netto | -384 |
| Ársúrslit | 1.550 |
| **Fíggjarstøða:** | |
| Fíggjarstøðujavni | 843.645 |
| Eginogn | 783.711 |
| **Pengastreymar:** | |
| Rakstur | 9.748 |
| Íløgur | -80.548 |
| Fígging | 48.187 |
| **Starvsfólk:** | |
| Starvsfólk í miðal | 48 |
| **Lyklatøl í %: *)** | |
| Eginognarpartur | 92,9 |
| Renting av eginogn | 0,4 |

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal 2010". Lyklatøl við negativum virði verða ikki víst. Lyklatølini eru allýst undir nýttum roknskaparhátti.

## Høvuðs- og lyklatøl fyri móðurfelagið

| | 2014<br>t.kr. | 2013<br>t.kr. | 2012<br>t.kr. | 2011<br>t.kr. | 2010<br>t.kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur:** | | | | | |
| Bruttoúrslit | 30.402 | 29.304 | 27.406 | 23.503 | 23.321 |
| Rakstrarúrslit | 1.238 | 3.920 | -5.560 | -533 | -1.068 |
| Fíggjarligir postar, netto | 489 | 363 | 893 | 1.930 | 2.340 |
| Ársúrslit | 1.550 | 2.621 | -3.827 | 1.145 | 1.043 |
| **Fíggjarstøða:** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 835.308 | 798.134 | 736.624 | 689.939 | 587.532 |
| Eginogn | 781.967 | 720.417 | 699.896 | 573.822 | 572.677 |
| **Pengastreymar:** | | | | | |
| Rakstur | 7.781 | 5.345 | 12.085 | 11.558 | 8.346 |
| Íløgur | -77.463 | -82.591 | -58.140 | -139.473 | -64.245 |
| Fígging | 43.368 | 57.760 | 53.329 | 95.089 | 1.206 |
| **Starvsfólk:** | | | | | |
| Starvsfólk í miðal | 36 | 35 | 33 | 31 | 33 |
| **Lyklatøl í %: *)** | | | | | |
| Eginognarpartur | 93,6 | 90,3 | 95,0 | 83,2 | 97,5 |
| Renting av eginogn | 0,2 | 0,4 | | 0,2 | 0,2 |

*) Lyklatølini eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal 2010". Lyklatøl við negativum virði verða ikki víst. Lyklatølini eru allýst undir nýttum roknskaparhátti.

## Leiðslufrágreiðing

### Virksemi

P/F Vága Floghavn varð stovnað á aðalfundi 14. juni 2007 við heimild í løgtingslóg nr. 29 frá 30. apríl 2007. Endamálið við felagnum er at reka floghavnsvirksemi og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

### Eitt gott ár fyri Vága Floghavn

Árið 2014 hilnaðist væl hjá i Vága Floghavn. Ferðafólkatalið setti aftur met í 2014 og samstundis sum floghavnin er dagførd við longdari flogbreyt og nýggja farstøðin er liðug, er grundraksturin met góður. Vága Floghavn er ein sunn fyritøka, sum er væl brynjað til framtíðina, og til at taka á seg uppgávuna at knýta Føroyar nærri at útheiminum.

### Útbygging av flogvølli

Í desember 2011 lendi fyrsta flogfarið á nýggja longda vøllinum, sum varð longdur úr 1250 metrum upp í 1799 metrar. Longdi vøllurin hevur, saman við nýggju ljósskipanini og nýggju innflúgvingartólunum roynst væl, og betringarnar hava bøtt munandi um flogvallarviðurskiftini í Føroyum.

Høvuðsendamálið við at leingja flogvøllin, var at økja um møguleikarnar at menna flogvinnu í Føroyum. Leingingin hevur longu ført við sær, at fleiri sløg av flogførum nýta flogvøllin, og beinleiðis flogferðsla er byrjað ímillum Føroyar og meiri fjarskotin lond. Nevnast kunnu ruturnar hjá Atlantic Airways til Barcelona og Mallorca, ið er komið ístaðin fyri Milano, sum sambært Atlantic Airways ikki var ein nóg burðardygg farleið.

Nýggju Airbus 319 flogførini hjá Atlantic Airways hava roynst væl á nýggju flogbreytini. Eisini hava onnur flogfeløg við øðrum flogtypum, sum hava verið á flogvøllinum latið væl at nýggju umstøðunum. Eitt nú kann nevnast Austrian við einum A320, Jet Time við einum B737-700, bmi regional við E-145, Estonian við E-190 og hópin av øðrum.

### Nýggj farstøð

Arbeiðið at útbyggja floghavnina gekk eftir ætlan, og var liðugt á sumri 2014. Farstøðin varð tikin í nýtslu áðrenn háárstíðina 2014, og royndirnar tað fyrsta hálva árið vísa, at bygningurin livir væl upp til væntanir og krøv. Nakrar tillagingar skulu gerast fyri at fáa farstøðina til at mennast enn meira, og verður farstøðin ment eftir teimum royndum sum ferðafólk og starvsfólk gera sær. Nýggju nútíðarhóskandi umstøðurnar geva Vága Floghavn góðar møguleikar at mennast, og størsti denturin verður lagdur á, at veita ferðafólkunum best møguligu upplivingina.

## Leiðslufrágreiðing



Ferðin gjøgnum farstøðina skal vera so ómakaleys sum gjørligt. Tí eru settar fleiri check in automatir upp, samstundis sum tvey av viðførisbondunum eru gjørd til sjálvavgreiðslu. Sjálvavgreiðsla er einføld at nýta, og loysnin hevur víst seg, at rigga væl. Arbeitt verður leypandi við at tillaga økið til broyttu umstøðurnar, og tryggja, at ferðafólk vita hvussu tey skulu fyrihalda seg til trygdareftirlitið fyri at fáa tað at ganga so væl og skjótt sum gjørligt.

Í nýggju farstøðini er matstova og stórur Duty Free handil fyri bæði komandi og farandi ferðafólk. Loysnin er skynsom fyri Vága Floghavn og hugaligari fyri ferðafólkið.



Byggiarbeiðið gekk væl, tíðarætlan og kostnaður helt, hóast vánaliga veðrið í vetur 2013 seinkaði arbeiðinum.

## Leiðslufrágreiðing

**Gott úrslit**

Sum nevnt, so var 2014 eitt hendingaríkt og gott ár fyri Vága Floghavn. Eftir avskrivingar, men áðrenn skatt, hevði P/F Vága Floghavn eitt avlop uppá 1,7 milliónir krónur.

Avskrivingar kunnu væntast at ávirka úrslitið hjá Vága Floghavn enn meira í 2015, tá ið nakrir bygningar skulu takast niður.

Tað liggur fast at gamla sweepergaragan skal takast niður og arbeitt verður við tí í løtuni. Enn er ivasamt um bygningurin har gamla brandgaragan verður tikin niður ella kann brúkast til onnur endamál. Tó liggur fast at tornið og bygningurin rundanum tornið ikki verður tikin burtur, men framhaldandi verður í rakstri eins og nú.

Bruttoúrslitið í 2014 er 30,4 mió. kr., í mun til 29,3 í 2013 og 27,4 mió. kr. í 2012.

**Arbeiða við at effektivisera raksturin enn meira**

Nevndin avgjørdi í 2014, at tá stóru útbyggingarverkætlaninar vóru lidnar, skuldi arbeiðast við at skipa raksturin av virkseminum á flogvøllinum, so hann verður tillagaður nýggju karmarnar, og verður effektiviseraður enn meira. Eisini henda stórar broytingar og herðingar av myndugleikakrøvum til flogvallir í hesum árum, og skal raksturin og allar mannagongdir tí eisini tillagast til nýggju krøvini.

Hin 1. desembur 2014 tók Jákup Egholm Hansen við sum nýggjur rakstrarleiðari á flogvøllinum, og arbeiðið at tillaga raksturin til nýggju karmarnar fór í gongd beinanvegin. Hetta arbeiðið er skipað sum ein verkætlan, við luttøku av leiðslu, starvsfólkum og av ráðgevum, og verður hesin parturin av arbeiðinum liðugur á vári í 2015.

Afturat hesum verður eisini arbeitt við fleiri øðrum verkætlanum. Gamla komu- og fráfaringarhøllin verður umbygd og eru fleiri av hølunum leigaði út, fyrst og fremst til virksemi, sum hevur samband við virksemi á flogvøllinum, men eisini til annað virksemi.

Eisini verður arbeitt við nútímansgerð av torninum á flogvøllunum, og av útgerðini í torninum. Hetta arbeiði verður eftir ætlan liðugt í seinnu helvt av 2015.

Á tilbúgvingarøkinum verður eisini arbeitt við at nútímansgera útgerðina, og er ætlanin at bíleggja tveir nýggjar sløkkiliðsbilar í 2015.

Og av størri verkætlanum og íløgum kann at enda nevnast, at tað eisini verður arbeitt við enn fleiri íløgum fyri at bøta um parkeringsviðurskiftini við farstøðina. Ætlanin er at víðka um parkeringsøkið, eins og tað eisini skal skipast øðrvísi.

Vága Floghavn hevur eisini bílagt eina nútímans og meira brúkaravinarligari gjaldsskipan til gjald av parkeringsgjøldum. Skipanin virkar á sama hátt sum gjaldsskipaninar í undirstjóvartunnlunum. Fólk kunnu gjalda umvegis heimasíðuna hjá flogvøllinum, í farstøðini ella við eftirkravi. Eisini verður arbeitt við at menna skipanina soleiðis, at gjaldast kann umvegis fartelefonina. Eftir ætlan verður gjaldsskipanin virkin frá á sumri 2015.

## Leiðslufrágreiðing

**Nýggjar inntøkur og meiri virksemi**

Góða úrslitið er liður í eini miðvísari ætlan at menna nýggjar inntøkumøguleikar, samstundis sum eitt vakið eyga hevur verið hildið við útreiðslunum. Eitt nú vóru lønarútreiðslurnar í 2014 ávirkaðar av, at fleiri fólk hava verið til arbeiðis í samband við upplating og royndarkoyring av nýggju umstøðunum. Harumframt hava starvsfólk hjá Vága Floghavn arbeitt nógv við at umbyggja gomlu farstøðina til onnur endamál. Eitt nú eru hølir gjørd til flutningsfyritøkuna EUR-Express, sum í næstum eisini flytur sítt virksemi á flogvøllin.

Ein vaksandi partur av inntøkugrundarlagnum hjá Vága Floghavn er nú leigugjøld umframt meira inntøkur, provisiónsgjøld, í sambandi við matarsølu og tollfría sølu. Ætlanin er, at hesar inntøkur skulu vaksa enn meira framyvir, meðan tænastugjøldini til flogferðslu helst skulu lækka við tíðini.

Fyrsta tekin um ein sunnan rakstur, ið gagnar ferðafólkunum, bleiv fráboðaður í mars 2015, tá ið Vága Floghavn lækkaði tænastugjøldini við 12% frá 185 kr. til 165 kr. Við hesum kom Vága Floghavn út við einum lægri tænastugjaldi enn eitt nú Kastrup, sum hevur eitt tænastugjald á 175 kr.

Áðrenn Vága Floghavn varð yvirtikin í 2007, gav raksturin hall á hvørjum ári. Árini 1995 til 2008 var hallið millum 9 og 14 mió.kr, samstundis sum uppgávur, sum í dag verða gjørdar í Føroyum, tá vóru gjørdar í Danmark. Tí var tað neyðugt at hækka gjøldini, men eftir at raksturin er komin í eina tryggja legu, so lækkar Vága Floghavn gjøldini, tá ið tað er ráðiligt, og øll menningin á flogvøllinum kemur sostatt føroyskari flogvinnu og føroyskum ferðafólkum til góðar.

Vága Floghavn er partur av One Stop Security økinum, sum ger, at føroysk flogvinna og ferðafólk kunnu flúgva trygt og frítt til allar flogvallir í ES. Fyri at lúka treytirnar, so má flogvøllurin leypandi gera íløgur í nýggja útgerð og útbúgva starvsfólkini leypandi, so at flogvøllurin altíð livur upp til allar tær nýggju ásetingarnar, sum ES og Danmark krevja. Hetta førir sosatt við sær hægri lønar-, rakstrar- og íløguútreiðslur.

Sum sagt so verða avskrivingar í sambandi við, at bygningar á airside verða tiknir burtur. Her er, sum sagt, longu avgjørt at gamla sweepergaragan verður tikin niður, men endalig støða er ikki tikin til gomlu brandgaraguna enn. Eyka avskrivingar fara væntandi at síggjast aftur í úrsliti felagsins í 2015.

Men jaliga gongdin hjá felagnum heldur fram, hóast serligu avskrivingarnar síggjast aftur.

Nú leingingin av vøllinum er gjøgnumførd, og arbeiðið uppá nýggju farstøðina og tænastubygningarnar er liðugt, kann felagið savna seg um at skapa støðugar karmar fyri framhaldandi rakstri felagsins, og gera neyðugar tillagingar og smærri útbyggingar.

**Ferðsluviðurskifti**

Ferðafólkatalið í Vága Floghavn setti met í 2014, tá ið 250.287 ferðafólk ferðaðust um flogvøllin.

Tað er ein framgongd í mun til 2013 uppá 6% ella 14.060 ferðafólk fleiri. Gamla metið varð sett í 2013, tá 236.181 ferðafólk fóru um Vága Floghavn.




**Fleiri ferðafólk og fleiri flogfeløg**

Vága Floghavn hevur góðar vónir fyri 2015. Vøksturin í ferðafólkatalinum fyrstu tríggjar mánaðirnar í 2015 hevur verið 16,4% ella 7.166 fleiri ferðandi. Tó skal leggjast til merkis at sólarmyrkingin í mars verður mett til at eiga umleið 4.000 av hesum ferðafólkunum.

Í Føroyum eru tekin um búskaparvøkstur, og nógv bendir á, at ferðavinnan fer at vaksa í 2015, men longu nú er greitt, at tað verður ongin oljuflúgving í 2015, og kemur hetta at merkjast á ferðafólkatalinum. Eisini er ivasamt, hvussu nógvir føroyingar koma at flúgva ímillum eitt nú Noreg og Føroyar, nú oljuprísurin er so lágur sum hann er.

Eftir, at flogvøllurin varð longdur, hevur framburður verið innan føroyska flogvinnu. Tølini vísa, umframt eina framgongd í ferðafólkatalinum, at vanliga ferðslureglusemið, ávirkað av veðri og vindi, er batnað. Reglusemið í 2014 var gott, og fáar seinkingar og avlýsingar vóru.

Ferðafólk kunnu nú í nógv størri mun líta á, at tey kunnu koma ella fara til ásetta tíð í Vágum, og hevur hetta stóran týdning fyri menningina av Føroyum sum ferðamannaland. Hetta merkir, at bæði føroyskir og útlendskir ferðavinnusmiðir í størri mun kunnu líta á, at gestir teirra koma og heim til ásetta tíð, og í nógv minni mun verða ávirkaði av seinkingum og møguligum avlýsingum.

## Leiðslufrágreiðing



Atlantic Airways er einasta flogfelag, sum flýgur regluliga ímillum Føroyar og útheimin. Men flogvøllurin hevur seinasta árið havt vitjan av fleiri flogførum og flogfeløgum, sum annars ikki hava roynt seg í Vágum áður.

**Hvaðani kom vøksturin?**

Tølini hjá Vága Floghavn vísa, at talan er um fleiri útlendsk ferðafólk, og at føroyingar eisini eru farnir at ferðast meira umvegis Vága Floghavn. Harafturat sæst í tølunum, at sjálvt um Atlantic Airways flýgur beinleiðis úr Vágum til heitari lond, so sæst tað ikki aftur í ferðafólkatalinum til Danmarkar.

Av teimum størru leiðunum vísa tølini, at flest ferðafólk flúgva til Keypmannahavnar, og tann parturin veksur framvegis. Harnæst vísa tøl hjá Vága Floghavn, at næststørsta leiðin hjá Atlantic Airways er til Billund, síðani koma Noreg, Ísland og Bretland.

**DUTY FREE FAE**

Roknskapurin hjá Vága Floghavn fevnir eisini um ein konsernrokniskap sum tekur hædd fyri dótturfelagnum, Duty Free FAE, sum Vága Floghavn eigur saman við Atlantic Airways. Duty Free FAE hevur síðan 17. Juni 2014 staðið fyri allari tollfríari sølu á flogvøllinum, og fegnast Vága Floghavn um gongdina í felagnum. Felagið hevur nakrar fastar avtalur um leigugjøld við meira og er felagið skrásett fyri 12 ársverk.

Duty Free FAE hevur eitt nógv størri úrval enn gomlu taxfree handlarnir á flogvøllinum, og hevur eina tíðarhóskandi heimasíðu, har øll ferðandi kunnu hyggja eftir teimum vørum, sum tey kunnu ynskja at keypa. Eftir eingangsútreiðslur til eitt nú inventar, IT við meira og fastar útreiðslur til eitt nú leigu og starvsfólk, so hevði Duty Free FAE eitt yvirskot uppá 1,5 mio. kr. Nevnd og leiðsla í Duty Free FAE væntar at yvirskotið verður hægri í 2015.

**Onnur mál**

Í samband við menning av flogvøllinum annars, so er ikki nakað útyvir tað vanliga sum Vága Floghavn metir at hava ávirkan á fíggjarlig vandamál. Tó við tí fyrivarni av hendingum, sum Vága Floghavn ikki hevur beinleiðis ávirkan á. Hetta kann verða avbjóðingar innan búðskaparvøkstur, sum kann ávirka hugin hjá fólkum at ferðast. Eisini óbeinleiðis ávirkan innan broytingar í lógarverkinum sum kunnu ávirka raksturin av flogvinnu í Føroyum.

Eitt annað mál sum hevur verið frammi er, at Vørn kærdi nýtsluloyvið, sum Vága Floghavn fekk frá Sørvágs Kommunu 4. Juli 2014. Kærunevndi í lendismálum, vísti kæruni frá sær og staðfesti, at Vørn ikki var partur av málinum. Aðrir partar hava eisini víst málinum frá sær og meina ikki, at Vørn er partur av málinum.

Vága Floghavn tykist at vera enda í einari umsitingarligari fløkju hjá Brunaeftirlitinum, sum alment hevur sáað iva um fólkatrygdina á farstøðini. Brunaeftirlitið hevur sáað henda iva, hóast umboð fyri Brunaeftirlitið ongantíð hevur verið á staðnum á arbeiðsvitjan.

Vága Floghavn hevur fingið staðfest at tær gjøgnumgongdir sum hava verið av bygninginum lata ongan iva verða um, at bruna- og persónstrygdin í nýggju farstøðini er í ordan, og ongin brek ella manglar, sum kunnu seta bruna- og persónstrygdina í vanda, eru staðfestir.

Vága Floghavn arbeiðir tætt saman við Umhvørvisstovuni til tess at tryggja, at umhvørvi í og við flogvøllin, livur upp til tey krøv, sum er sett til virksemi av tí slagi, sum flogvøllurin fæst við.

Sum upplýst í leiðslufrágreiðingini í ársfrásøgnini fyri 2013, er endurgjaldskrav reist móti felagnum viðvíkjandi ognartøku av lendi í sambandi við leingingina av flogvøllinum. Dómur er fallin í Føroya Rætti, tann 31. mars 2014, har kravið er gjørt upp til 10,5 mió.kr. Dómurin er kærdur til hægri rætt.

**Framtíðarútlit fyri menning og vøkstur hjá Vága Floghavn**

Leiðsla og nevnd í Vága Floghavn hava góðar vónir um framtíðina. Roknskapur felagsins vísir, at inntøkugrundarlagið hjá felagnum er ment, og raksturin er burðardyggur, hóast umbyggingin krevur eyka avskrivingar, og at rakstrarútreiðslurnar eru vaksnar, partvís sum avleiðing av størri farstøð, sum krevur meira el og olju enn tann gamla. Harumframt so krevja tænastubygningarnir sum húsa eitt nú Vága Floghavn meira orku enn áður. Vága Floghavn hevur harumframt eisini lánfíggjaði leigumál við eitt nú Taks, Færøernes Politi, Atlantic Airways, Posta og nú eisini EUR-Express.

Longdi flogvøllurin og nýggju innflúgvingartólini hava betrað um reglusemið í Vágum. Leiðslan í Vága Floghavn vil framhaldandi arbeiða tætt saman við Trafikstyrelsen, fyri at tryggja, at ásetingarnar hjá flogvøllinum í Vágum, í enn størri mun, bøta um reglusemið.

Vága Floghavn yvirtók í 2012 søluna av brennievni til flogfør, sum nýta flogvøllin. Men síðani flogførini, sum brúka flogvøllin, eru vorðin størri, eru tey í størri mun farin at taka brennievni uttanlands, serliga í Danmark. Vága Floghavn vil saman við brúkarum og avvarandi myndugleikum, nú leggja seg eftir at betra um kappingarførið av fueltøkuni í Føroyum mótvegis útheiminum.

Vága Floghavn fegnast um, at Atlantic Airways hevur økt um talið av ferðamálum, og nú eisini leggur

Mallorca og Edinburg afturat rutunetinum. Sum nevnt, so arbeiðir Vága Floghavn saman við føroyska flogfelagnum, til tess at økja um eftirspurningin eftir flogferðum í lágárstíðum. Royndirnar frá 2013 og 2014 vísa, at samstarvið hevur økt um eftirspurningin eftir flogferðum í tíðarskeiðum, har tað hevur verið torført at fáa fólk at ferðast.

Í 2013 og 2014 hevur Vága Floghavn verið á útvaldum sølustevnum uttanlands, og hevur framt lýsingarherferðir fyri at økja um áhugan fyri bæði flogvøllinum og Føroyum sum ferðamannalandi. Vága Floghavn fegnast um øktu játtanina til Visit Faroe Islands, og vil menna samstarvið við Visit Faroe Islands, og føroyska ferðavinnu, enn meira.

Í 2013 bjóðaði Vága Floghavn út veitingarmøguleikar av taxfree og matarstøðum á flogvøllinum. Vága Floghavn valdi saman við Atlantic Airways, at stovna P/F Duty Free, sum feløgini eiga helvt um helvt.

Fyri Vága Floghavn merkir nýggja samstarvið, at flogvøllurin vinnur eyka inntøkur, og fær ein skynsamari rakstur. Felagið Gist&Vist fer at reka matarstøðini í Vága Floghavn.

Nú nýggja farstøðin er tikin í nýtslu er ætlanin, at gamla farstøðin skal gagnnýtast eitt nú tá ið óreglusemi er í flúgvingini, til goymslu hjá Duty Free FAE og Atlantic Airways. Eisini húsast EUR-Express í gomlu farstøðini.

**Sólarmyrkingin 20. mars 2015**

20. mars var sólarmyrking í Føroyum, og setti hetta stór krøv til flogvøllin. Umframt at Atlantic Airways hevði sett meira inn fyri at nøkta allan tørvin, so høvdu fleiri nýggj feløg, sett fram ynskir um at fáa loyvi til at lenda á flogvøllinum. Hetta setti stór krøv til bæði tann operativa partin, tí at hesi feløg ikki høvdu roynt flogvøllin fyrr, og harumframt setti tað stór krøv til avgreiðsluna og avgreiðslutíðina í sjálvari farstøðini.

Tað gekk sera væl, og vóru 17 ymiskar avgreiðslur av ymsum flogførum og flogtypum avgreiddar. Serliga áhugavert var at avgreiða MD-83 flogfarið hjá Danish Air Transport, sum við sínum 45 metrum er longsta ferðafólkaflogfar sum nakrantíð hevur lent í Føroyum.

## Leiðslufrágreiðing




Royndirnar við at avgreiða nýggj flogfør og nýggjar flogtypur hevur givið Vága Floghavn høvi til at vísa fram nýggju umstøðurnar fyri operatørum, sum ongantíð hava verið í Føroyum fyrr. Tað er ongin ivi um, at potentialið er stórt og at Vága Floghavn miðvíst vil arbeiða víðari við teimum royndum, sum flogvøllurin nú hevur gjørt sær.

**Samanumtikið**

Samanumtikið kann sigast, at Vága Floghavn hevur góðar vónir um framtíðina. Vøksturin í ferðafólkatalinum heldur fram og seinastu 10 árini er ferðafólkatalið vaksið heili 43%.

Betraðu umstøðurnar framtíðartryggja virksemið á flogvøllinum, og tryggja ikki minst betri inntøkumøguleikar av eitt nú parkering, tollfríari sølu á flogvøllinum, og øktari sølu á matstøðum við meira.

Vága Floghavn arbeiðir sostatt víðari við at menna umstøðurnar á flogvøllinum, og at kanna møguleikarnar fyri at økja regularitetin enn meira og tryggja, at Atlantic Airways fær so góðar umstøður til at menna teirra virksemi so væl sum møguligt.

Eisini vil Vága Floghavn framhaldandi arbeiða við rutumenning, og við at menna ferðsluna til og frá Føroyum best møguligt, soleiðis at nýggju umstøðurnar verða gagnnýttar á skilabestan hátt, og fyri at tryggja framhaldandi ferðafólkavøkstur.

**Hendingar eftir roknskaparlok**

Eftir roknskaparlok er onki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársfrásøgn felagsins.

## Nýttur roknskaparháttur

Árs- og konsernfrásøgnin fyri P/F Vága Floghavn er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í flokki C.

Árs- og konsernfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva koncernin fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr konsernin, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið, sum ognin ella skyldan varar. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum upprunaligt útveganarvirði frádrigið møguligar avdráttir, umframt ískoyti/frádrátt av samlaðu amortiseringini av muninum millum útveganarvirði og áljóðandi virði. Á henda hátt verða kurstap og kursvinningur býtt yvir tíðarskeiðið, sum ognin ella skyldan varar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**Konsernroknskapurin**

Konsernroknskapurin fevnir um móðurfelagið P/F Vága Floghavn og atknýtt feløg, har P/F Vága Floghavn beinleiðis ella óbeinleiðis eigur meira enn 50% av atkvøðurættindunum ella á annan hátt hevur avgerandi ávirkan.

## Nýttur roknskaparháttur

Í konsolideringini verða allar konserninnanhýsis inntøkur og útreiðslur, partabrævaognir, innanhýsis millumverandi og vinningsbýti eliminerað. Somuleiðis verður staðfestur og óstaðfestur vinningur og tap frá handlum millum konsolideraðu feløgini elimineraður.

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða javnaðir við lutfalsliga partinum av handilsvirðinum á nettoognum og skyldum hjá atknýttu feløgunum á útveganardegnum.

Keypt ella nýstovnað feløg verða innroknað í konsernroknskapin frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða innroknað í konsolideraða rakstrarroknskapin fram til avhendingardagin. Samanberingartøl verða ikki rættað viðvíkjandi keyptum, seldum ella avtiknum feløgum.

Í sambandi við keyp av nýggjum feløgum verður yvirtøkuhátturin nýttur. Sostatt verða eyðmerktar ognir og skyldur hjá nýútvegaðu feløgunum virðisásett til dagsvirði á útveganardegnum. Avsett skylda verður innroknað fyri kostnaðir í sambandi við samtyktar og kunngjørdar umskipanir í nýútvegaða felagnum sum úrslit av keypinum.

Positivir munir (goodwill) millum útveganarvirðið og dagsvirðið á teimum eyðmerktu yvirtiknu ognunum og skyldunum, íroknað avsettar skyldur til umskipanir, verða innroknaðir undir immateriellari støðisogn og avskrivaðir javnt yvir rakstrarroknskapin eftir leiðslunnar metingum av fíggjarligu livitíðunum, tó í mesta lagi 20 ár. Negativir munir (negativt goodwill), sum samsvara við eina væntaða negativa gongd í ávísu fyritøkunum, verða innroknaðir í fíggjarstøðuna undir tíðaravmarkingar og verða innroknaðir í rakstrarroknskapin, so hvørt negativa gongdin verður staðfest. Av negativum goodwill, sum ikki viðvíkur væntaðari negativari gongd, verður ein upphædd svarandi til handilsvirðið á ikki-peningaligum ognum innroknað í fíggjarstøðuna, sum síðani verður innroknað í rakstrarroknskapin yvir miðallivitíðina hjá ikki-peningaligu ognunum.

Goodwill og negativt goodwill frá keyptum feløgum kann javnast fram til árslok árið eftir útvegan.

Vinningur ella tap, sum standast av at avhenda ella avtaka atknýtt feløg og assosierað feløg, verða uppgjørd sum munurin millum søluupphæddina ella avtøkuupphæddina og tað roknskaparliga virðið av nettoognum á søludegnum íroknað ikki avskrivað goodwill og væntaðar kostnaðir til sølu ella avtøku.

### Minnilutaáhugamál

Í konsernroknskapinum verða roknskaparpostarnir hjá atknýttum feløgum innroknaðir 100%. Tann lutfalsligi partur, sum minnilutaáhugamál eiga av úrsliti og eginogn hjá atknýttum feløgum, verður javnaður árliga og verður tikin við í serstakum postum í rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu.

## Rakstrarroknskapurin

### Bruttoúrslit

Bruttoúrslit umfatar nettosølu, broytingar í goymslum av liðugvørum og vørum í gerð, arbeiði fyri egna rokning, sum er skrásett undir ogn, aðrar rakstrarinntøkur og annan uttanhýsis kostnað.

## Nýttur roknskaparháttur

Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskapar-lok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meir-virðisgjald, avgjøld og við avsláttri í sambandi við søluna frádrignum.

Aðrar rakstrarinntøkur og rakstrarkostnaðir umfata roknskaparpostar, sum hava minni týdning í mun til høvuðsvirksemið hjá felagnum, herímillum vinning og tap við sølu av immateriellari og materiellari støðisogn.

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir, tap av áognarum og operationellar leasingkostnaðir.

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**Av- og niðurskrivingar**

Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

**Fíggjarpostar**

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

**Inntøkur av kapitalpørtum í atknýttum feløgum**

Í rakstrarroknskapi hjá móðurfelagnum verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýtta felagnum innroknaður, eftir eliminering av innanhýsis vinnigi ella tapi, umframt fráfrátt av avskrivingum av konserngoodwill.

**Skattur av ársins úrsliti**

Skattur í árinum, ið er partafelagsskatturin fyri árið og broytingin í útsettum skatti, verður innroknaður í rakstrarroknskapinum við tí parti, sum viðvíkur ársúrslitinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður bókaður á eginognina.

## Fíggjarstøðan

**Immateriell støðisogn**

Immateriell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar.

## Nýttur roknskaparháttur

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Telduskipanir | 5 ár | 0 % |

**Materiell støðisogn**

Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis er knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Slitlag o.a. | 15 ár | 0 % |
| Bygningar, brunnar v.m. | 50 ár | 40 % |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3-10 ár | 0-20 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

**Niðurskriving av støðisogn**

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á bæði immateriellari og materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

**Innrætting av leigaðum hølum**

Innrætting av leigaðum hølum verður virðisásett til útveganarvirði við frádrátti av samlaðum avskrivingum. Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðina hjá ognini, sum er 10 ár.

## Nýttur roknskaparháttur

**Fíggjarlig støðisogn**

**Kapitalpartar í atknýttum feløgum**

Kapitalpartar í atknýttum feløgum verða innroknaðir í fíggjarstøðuna við lutfalsliga partinum av roknskaparliga innara virðinum hjá feløgunum. Innara virðið verður uppgjørt eftir roknskaparháttinum hjá móðurfelagnum, eftir at hædd er tikin fyri óásannaðum konserninnanhýsis vinningi og tapi, umframt frádrátti ella ískoyti av positivum ella negativum goodwill uppgjørt eftir yvirtøkuháttinum.

Atknýtt feløg og assosierað feløg við negativum roknskaparligum innara virði, verða innroknað uttan virði. Møgulig áogn hjá hesum feløgum verður niðurskrivað við lutfalsliga partinum hjá móðurfelagnum av tí negativa innara virðinum, í tann mun áognin verður mett at vera mist. Um roknskaparliga negativa innara virði er hægri enn áognin, verður restupphæddin innroknað undir avsettum skyldum í tann mun, móðurfelagið hevur rættarliga ella ítøkiliga skyldu til at svara fyri negativu eginognini hjá hesum feløgum.

Nettouppskriving av kapitalpørtum í atknýttum feløgum verður skrásett undir eginognini í tiltaksgrunninum fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum, í tann mun roknskaparliga virðið er hægri enn útveganarvirðið. Vinningsbýti frá atknýttum feløgum, ið kann væntast at vera samtykt, áðrenn hendan ársfrásøgnin verður góðkend, verður ikki bundið í innanvirðisgrunninum. Tiltaksgrunnurin verður javnaður við øðrum rørslum í eginognini í atknýttum feløgum.

Keypt ella nýstovnað feløg verða í ársfrásøgnini innroknað frá útveganardegnum. Seld ella avtikin feløg verða innroknað fram til avhendingardagin.

Vinningur ella tap við at avhenda atknýtt- og assosierað feløg, verða uppgjørd sum munurin millum avhendingarupphæddina og roknskaparliga virðið á nettoognum á søludegnum íroknað írestandi konserngoodwill, umframt væntaðar kostnaðir frá sølu ella avtøku. Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir fíggjarligum postum.

Í sambandi við keyp av nýggjum atknýttum feløgum og assosieraðum feløgum verður yvirtøkuhátturin nýttur. Sostatt verða ognir og skyldur hjá nýútvegaðu feløgunum virðisásett til dagsvirði útveganardagin. Avsetingar verða gjørdar fyri kostnaðir í sambandi við samtyktar umskipanir í nýútvegaða felagnum sum úrslit av yvirtøkuni. Hædd verður tikin fyri skattaávirkanini av broyttu metingunum, sí annars frágreiðing um goodwill niðanfyri.

Positivir munir (goodwill) millum útveganarvirði og dagsvirði av yvirtiknum ognum og skyldum, íroknað avsettar skyldur til umskipanir, verða innroknaðir undir kapitalpørtum í atknýttum feløgum. Munurin verður avskrivaður yvir mettu fíggjarligu brúkstíðina, ið verður ásett eftir teimum royndum, ið leiðslan hevur á einstøku virkisøkjunum. Avskrivingartíðin er í mesta lagi 20 ár, og er avskrivingartíðin longst fyri strategist útvegað feløg við sterkari marknaðarstøðu og longum inntøkuprofili. Mett verður um roknskaparliga virðið av goodwill javnan, og verður tað niðurskrivað umvegis rakstrarroknskapin, tá roknskaparliga virðið er hægri enn væntaðar framtíðar nettoinntøkur frá tí felagnum ella tí virkseminum, ið goodwill er knýtt at.

## Nýttur roknskaparháttur

**Vørugoymsla**

Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFO-háttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

**Virðisbrøv og kapitalpartar**

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað sum ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (virðisbrævamarknaðarkurs) við roknskaparlok.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, ið varða undir 3 mánaðir, og sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

**Partafelagsskattur og útsettur skattur**

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

## Nýttur roknskaparháttur

**Skuld**

Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað. Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirðið, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Pengastreymsuppgerð

Pengastreymsuppgerðin vísir konsersins og móðurfelagiðspengastreymar frá rakstri, íløgum og fígging fyri roknskaparárið, broytingar í tøkum peningi umframt tøkan pening við roknskaparbyrjan og roknskaparlok.

Tá feløg verða keypt ella seld, verður gjaldførisávirkanin víst fyri seg undir pengastreymum frá íløgum. Í pengastreymsuppgerðini verða pengastreymar viðvíkjandi keyptum feløgum innroknaðir frá útveganar-degnum, og pengastreymar viðvíkjandi seldum feløgum verða innroknaðir fram til søludagin.

**Pengastreymar frá rakstri**

Pengastreymar frá rakstri verða gjørdir upp sum ársúrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarpostar, broyting í rakstrarfígging og goldnan partafelagsskatt.

**Pengastreymar frá íløgum**

Pengastreymar frá íløgum umfata gjøld í sambandi við keyp og sølu av feløgum og virksemi umframt keyp og sølu av støðisogn.

**Pengastreymar frá fígging**

Pengastreymar frá fígging umfata broytingar í støðd ella samanseting av felagskapitali og kostnaðir í hesum sambandi. Harumframt umfata pengastreymarnir lántøku, avdráttir av rentuberandi skuld og útgoldið vinningsbýti til eigararnar.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar tøkan pening umframt stuttfreistað virðisbrøv, ið lætt kunnu umbýtast við tøkan pening, og har tað er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað í samsvari við Den Danske Finansanalytikerforenings "Anbefalinger & Nøgletal 2010".

Høvuðs- og lyklatølini í yvirlitinum eru roknað soleiðis:

| | |
|---|---|
| **Eginognarpartur** | $\frac{\text{Eginogn uttan minnilutaáhugamál ultimo x 100}}{\text{Skyldur tilsamans ultimo}}$ |
| **Úrslit*** | Ársúrslit, frádrigið partin hjá minnilutaáhugamálum |
| **Renting av eginogn** | $\frac{\text{Úrslit* x 100}}{\text{Eginogn í miðal uttan minnilutaáhugamál}}$ |

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | Móðurfelag 2014 kr. | 2013 t.kr. | Konsern 2014 kr. |
|---|---|---|---|---|
| | **Bruttoúrslit** | **30.401.989** | **29.304** | **35.099.220** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -19.662.480 | -19.119 | -22.232.416 |
| | Av og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | -9.501.142 | -6.265 | -9.685.094 |
| | **Rakstrarúrslit** | **1.238.367** | **3.920** | **3.181.710** |
| | Inntøka frá kapitalparti í dótturfelag | 744.372 | 0 | 0 |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 1.051.693 | 704 | 1.071.944 |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | -1.307.503 | -341 | -1.455.555 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **1.726.929** | **4.283** | **2.798.099** |
| 2 | Skattur av ársúrsliti | -176.827 | -1.662 | -503.625 |
| | **Ársúrslit** | **1.550.102** | **2.621** | **2.294.474** |
| | Úrslit hjá minnilutaáhugamálum | 0 | 0 | -744.372 |
| | **Konsernsins partur av ársúrslitinum** | **1.550.102** | **2.621** | **1.550.102** |

**Uppskot til býti av ársúrsliti:**

| | Móðurfelag 2014 kr. | 2013 t.kr. | Konsern 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| Tiltaksgrunnur fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum | 744.372 | 0 | 0 |
| Flutt úrslit | 805.730 | 2.621 | 1.550.102 |
| **Býtt tilsamans** | **1.550.102** | **2.621** | **1.550.102** |

# Fíggjarstøða 31. desember

## OGN

| Nota | | Móðurfelag 2014 kr. | Móðurfelag 2013 t.kr. | Konsern 2014 kr. |
|---|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | | |
| 3 | Ritbúnaður | 0 | 0 | 339.925 |
| | Immateriell støðisogn tilsamans | 0 | 0 | 339.925 |
| 4 | Lendi og flogbreyt | 588.082.836 | 560.121 | 588.082.836 |
| 5 | Bygningar, brunnar v.m. | 178.659.354 | 36.055 | 178.659.354 |
| 6 | Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 24.536.548 | 18.267 | 26.874.404 |
| 7 | Innrætting av leigaðum hølum | 0 | 0 | 1.223.273 |
| 8 | Útbygging av flogvøllinum (í gerð) | 976.774 | 110.819 | 976.774 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 792.255.512 | 725.262 | 795.816.641 |
| 9 | Kapitalpartur í atknýttum felagi | 1.744.372 | 0 | 0 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 1.744.372 | 0 | 0 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **793.999.884** | **725.262** | **796.156.566** |
| | **Ogn í umferð** | | | |
| | Framleiddar vørur og handilsvørur | 0 | 0 | 3.721.711 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 0 | 0 | 3.721.711 |
| | Vøru- og tænastuáogn | 2.677.855 | 2.833 | 2.677.855 |
| | Áogn hjá atknýttum feløgum | 2.322.114 | 0 | 0 |
| 10 | Útsett skattaáogn | 1.013.656 | 1.191 | 825.630 |
| | Onnur áogn | 1.100.334 | 8.135 | 2.179.674 |
| 11 | Tíðaravmarkingar | 0 | 206 | 0 |
| | Áogn tilsamans | 7.113.959 | 12.365 | 5.683.159 |
| | Onnur virðisbrøv og kapitalpartar | 0 | 32.093 | 0 |
| | Virðisbrøv tilsamans | 0 | 32.093 | 0 |
| | Tøkur peningur | 34.193.815 | 28.414 | 37.895.499 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **41.307.774** | **72.872** | **47.300.369** |
| | **OGN TILSAMANS** | **835.307.658** | **798.134** | **843.456.935** |

## Fíggjarstøða 31. desember

### SKYLDUR

| Nota | | Móðurfelag 2014 kr. | 2013 t.kr. | Konsern 2014 kr. |
|---|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | | |
| 12 | Felagskapitalur | 473.300.000 | 413.300 | 473.300.000 |
| 13 | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 304.495.623 | 304.496 | 304.495.623 |
| 14 | Tiltaksgrunnur fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum | 744.372 | 0 | 0 |
| 15 | Flutt úrslit | 3.426.727 | 2.621 | 4.171.099 |
| | **Eginogn tilsamans** | **781.966.722** | **720.417** | **781.966.722** |
| 16 | **Minnilutaáhugamál** | **0** | **0** | **1.744.372** |
| | **Skuld** | | | |
| 17 | Skuld til peningastovnar | 27.864.178 | 3.500 | 30.843.195 |
| | Langfreistað skuld tilsamans | 27.864.178 | 3.500 | 30.843.195 |
| 17 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 1.156.332 | 2.353 | 1.996.332 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 3.009.641 | 10.806 | 4.957.887 |
| | Skuld til assosierað feløg | 0 | 0 | 473.870 |
| | Partafelagsskattur | 0 | 0 | 138.772 |
| | Onnur skuld | 1.110.785 | 1.058 | 1.135.785 |
| | Inngoldin, men ikki skrásettur felagskapitalur | 20.200.000 | 60.000 | 20.200.000 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 25.476.758 | 74.217 | 28.902.646 |
| | **Skuld tilsamans** | **53.340.936** | **77.717** | **59.745.841** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **835.307.658** | **798.134** | **843.456.935** |

**18 Veðsetingar og trygdarveitingar**

**19 Eventualpostar**

**20 Nærstandandi partar**

## Pengastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember

| Nota | | Móðurfelag 2014 kr. | 2013 t.kr. | Konsern 2014 kr. |
|---|---|---|---|---|
| | Ársúrslit | 1.550.102 | 2.621 | 2.294.474 |
| 21 | Javningar | 9.160.375 | 7.564 | 10.542.938 |
| 22 | Broyting í rakstrarpeningi | -2.673.904 | -5.203 | -2.705.365 |
| | Pengastreymur frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar | 8.036.573 | 4.982 | 10.132.047 |
| | Rentuinngjaldingar og líknandi | 1.051.694 | 704 | 1.071.944 |
| | Rentuútgjaldingar og líknandi | -1.307.503 | -341 | -1.455.555 |
| | Pengastreymur frá vanligum rakstri | 7.780.764 | 5.345 | 9.748.436 |
| | **Pengastreymar frá rakstri** | **7.780.764** | **5.345** | **9.748.436** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -76.578.464 | -82.691 | -80.663.470 |
| | Søla av materiellari støðisogn | 115.180 | 100 | 115.180 |
| | Keyp av fíggjarligari støðisogn | -1.000.000 | 0 | 0 |
| | **Pengastreymar frá íløgum** | **-77.463.284** | **-82.591** | **-80.548.290** |
| | Upptøka av langfreistaðari skuld | 24.373.000 | 0 | 28.373.000 |
| | Broyting í langfreistaðari skuld | -1.205.220 | -2.240 | -1.386.202 |
| | Inngoldin - ikki skrásettur felagskapitalur | 20.200.000 | 60.000 | 20.200.000 |
| | Inngoldin felagskapitalur | 0 | 0 | 1.000.000 |
| | **Pengastreymar frá fígging** | **43.367.780** | **57.760** | **48.186.798** |
| | **Broyting í tøkum peningi** | **-26.314.740** | **-19.486** | **-22.613.056** |
| | Tøkur peningur primo | 60.508.555 | 79.994 | 60.508.555 |
| | **Tøkur peningur ultimo** | **34.193.815** | **60.508** | **37.895.499** |
| | **Tøkur peningur** | | | |
| | Tøkur peningur | 34.193.815 | 28.414 | 37.895.499 |
| | Virðisbrøv | 0 | 32.094 | 0 |
| | **Tøkur peningur ultimo** | **34.193.815** | **60.508** | **37.895.499** |

# Notur

| | Móðurfelag 2014 kr. | 2013 t.kr. | Konsern 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| **1. Starvsfólkakostnaðir** | | | |
| Lønir | 17.237.583 | 16.728 | 19.550.415 |
| Eftirlønir | 1.819.012 | 1.774 | 1.997.837 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 605.885 | 617 | 684.164 |
| | **19.662.480** | **19.119** | **22.232.416** |
| Stjórn | 1.081.439 | 971 | 1.081.439 |
| Nevnd | 420.400 | 639 | 453.727 |
| | **1.501.839** | **1.610** | **1.535.166** |
| Starvsfólk í miðal | 36 | 35 | 48 |
| **2. Skattur av ársúrsliti** | | | |
| Skattur av ársúrsliti | 0 | 0 | 138.772 |
| Broyting í útsettum skatti | 176.827 | 1.662 | 364.853 |
| | **176.827** | **1.662** | **503.625** |
| **3. Ritbúnaður** | | | |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 372.358 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **0** | **0** | **372.358** |
| Ársins av-/niðurskrivingar | 0 | 0 | -32.433 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **0** | **0** | **-32.433** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **0** | **0** | **339.925** |

| | Móðurfelag 31/12 2014 kr. | Móðurfelag 31/12 2013 t.kr. | Konsern 31/12 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| **4. Lendi og flogbreyt** | | | |
| Útveganarvirði primo | 577.088.919 | 577.274 | 577.088.919 |
| Tilgongd í árinum | 8.967.591 | 0 | 8.967.591 |
| Flytingar | 21.314.228 | -185 | 21.314.228 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **607.370.738** | **577.089** | **607.370.738** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -16.967.621 | -14.598 | -16.967.621 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -2.320.281 | -2.517 | -2.320.281 |
| Flytingar | 0 | 147 | 0 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-19.287.902** | **-16.968** | **-19.287.902** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **588.082.836** | **560.121** | **588.082.836** |
| **5. Bygningar, brunnar v.m.** | | | |
| Útveganarvirði primo | 44.075.637 | 49.351 | 44.075.637 |
| Tilgongd í árinum | 58.415.433 | 0 | 58.415.433 |
| Flytingar | 88.528.891 | -5.275 | 88.528.891 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **191.019.961** | **44.076** | **191.019.961** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -8.020.801 | -11.951 | -8.020.801 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -4.339.806 | -1.345 | -4.339.806 |
| Flytingar | 0 | 5.275 | 0 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-12.360.607** | **-8.021** | **-12.360.607** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **178.659.354** | **36.055** | **178.659.354** |

| | Móðurfelag 31/12 2014 kr. | Móðurfelag 31/12 2013 t.kr. | Konsern 31/12 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| **6. Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv** | | | |
| Útveganarvirði primo | 41.025.664 | 40.329 | 41.025.664 |
| Tilgongd í árinum | 9.195.440 | 1.798 | 11.620.030 |
| Frágongd í árinum | -199.000 | -1.031 | -199.000 |
| Flytingar | 0 | -71 | 0 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **50.022.104** | **41.025** | **52.446.694** |
| Av- og niðurskrivingar primo | -22.757.533 | -21.283 | -22.757.533 |
| Ársins av-/niðurskrivingar | -2.841.055 | -2.403 | -2.927.789 |
| Flytingar | 0 | -3 | 0 |
| Av-/niðurskrivingar, avhendaðar ognir | 113.032 | 931 | 113.032 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **-25.485.556** | **-22.758** | **-25.572.290** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **24.536.548** | **18.267** | **26.874.404** |
| **7. Innrætting av leigaðum hølum** | | | |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 1.288.058 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **0** | **0** | **1.288.058** |
| Ársins av-/niðurskrivingar | 0 | 0 | -64.785 |
| **Av- og niðurskrivingar ultimo** | **0** | **0** | **-64.785** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **0** | **0** | **1.223.273** |
| **8. Útbygging av flogvøllinum (í gerð)** | | | |
| Útveganarvirði primo | 110.819.893 | 29.816 | 110.819.893 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 80.892 | 0 |
| Flytingar | -109.843.119 | 111 | -109.843.119 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **976.774** | **110.819** | **976.774** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **976.774** | **110.819** | **976.774** |

| | Móðurfelag 31/12 2014 kr. | Móðurfelag 31/12 2013 t.kr. | Konsern 31/12 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| **9. Kapitalpartur í atknýttum felagi** | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan primo | 1.000.000 | 0 | 0 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **1.000.000** | **0** | **0** |
| Ársúrslit, áðrenn avskrivingar av goodwill | 744.372 | 0 | 0 |
| **Uppskrivingar ultimo** | **744.372** | **0** | **0** |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **1.744.372** | **0** | **0** |

**Høvuðstølini fyri felagið sambært tí seinastu góðkendu ársfrásøgnini**

| | | Eginogn kr. | Ársins úrslit kr. | Roknskaparligt virði hjá P/F Vága Floghavn kr. |
|---|---|---|---|---|
| P/F Duty Free, Sørvágur | 50 % | 3.488.744 | 1.488.744 | 1.744.372 |

| | Móðurfelag 31/12 2014 kr. | Móðurfelag 31/12 2013 t.kr. | Konsern 31/12 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| **10. Útsett skattaáogn** | | | |
| Útsett skattaáogn primo | 1.190.483 | 2.853 | 1.190.483 |
| Útsettur skattur av ársúrsliti | -176.827 | -1.662 | -364.853 |
| | **1.013.656** | **1.191** | **825.630** |
| **11. Tíðaravmarkingar** | | | |
| Undangoldin trygging | 0 | 99 | 0 |
| Stuðul v.m. | 0 | 107 | 0 |
| | **0** | **206** | **0** |
| **12. Felagskapitalur** | | | |
| Felagskapitalur primo | 413.300.000 | 395.400 | 413.300.000 |
| Kontant kapitalhækking | 60.000.000 | 17.900 | 60.000.000 |
| | **473.300.000** | **413.300** | **473.300.000** |

Felagskapitalurin er býttur sundur í partabrøv á kr. 1,00 og multipla av hesum. Øll partabrøvini hava somu rættindi.

Tey seinastu 5 árini hava hesar rørslur verið á felagskapitalinum:

| | |
|---|---|
| Kapitalhækking í 2012: | 129.900.000 kr. |
| Kapitalhækking í 2013: | 17.900.000 kr. |
| Kapitalhækking í 2014: | 60.000.000 kr. |

| | Móðurfelag | | Konsern |
|---|---|---|---|
| | 31/12 2014 | 31/12 2013 | 31/12 2014 |
| | kr. | t.kr. | kr. |
| **13. Yvirkursur við partabrævaútgávu** | | | |
| Yvirkursur við partabrævaútgávu primo | 304.495.623 | 304.496 | 304.495.623 |
| | **304.495.623** | **304.496** | **304.495.623** |
| **14. Tiltaksgrunnur fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum** | | | |
| Partur av ársúrsliti | 744.372 | 0 | 0 |
| | **744.372** | **0** | **0** |
| **15. Flutt úrslit** | | | |
| Flutt úrslit primo | 2.620.997 | 0 | 2.620.997 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 805.730 | 2.621 | 1.550.102 |
| | **3.426.727** | **2.621** | **4.171.099** |
| **16. Minnilutaáhugamál** | | | |
| Minnilutaáhugamál | 0 | 0 | 1.744.372 |
| | **0** | **0** | **1.744.372** |

| | Móðurfelag 31/12 2014 kr. | Móðurfelag 31/12 2013 t.kr. | Konsern 31/12 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| **17. Skuld til peningastovnar** | | | |
| Skuld til peningastovnar tilsamans | 29.020.510 | 5.853 | 32.839.527 |
| Fellur til gjaldingar innan 1 ár | -1.156.332 | -2.353 | -1.996.332 |
| | **27.864.178** | **3.500** | **30.843.195** |
| Restskuld, eftir 5 ár | 22.877.220 | 0 | 22.877.220 |

**18. Veðsetingar og trygdarveitingar**

Sum trygd fyri skuld til peningastovnar, 29.021 t.kr., er latið veð í fastari ogn. Veðsetingin er í mesta lagi 40 mió. kr.

Felagið hevur móttikið trygdarveitingar frá entreprenørum, leigarum o.t. uppá 16.705 t.kr.

Felagið hevur veitt 100 t.kr. sum trygd fyri tollkreditti.

**19. Eventualpostar**

**Eventualskyldur**

Endurgjaldskrav er reist móti felagnum viðvíkjandi ognartøku av lendi í sambandi við leingingina av flogvøllinum.

Dómur er fallin í Føroya Rætti, tann 31. mars 2014, har kravið er gjørt upp til 10,5 mió.kr. Dómurin er kærdur til hægri rætt.

**20. Nærstandandi partar**

**Eigaraviðurskifti**

Hesi eru skrásett í partabrævabók felagsins at eiga meira enn 5% av atkvøðunum ella meira enn 5% av partabrøvunum:

Føroya Land

| | Móðurfelag 2014 kr. | 2013 t.kr. | Konsern 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| **21. Javningar** | | | |
| Av- og niðurskrivingar av materiellari og immateriellari støðisogn | 9.472.110 | 6.265 | 9.655.702 |
| Inntøka frá kapitalparti í dótturfelag | -744.372 | 0 | 0 |
| Aðrar fíggjarligar inntøkur | -1.051.693 | -704 | -1.071.944 |
| Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 1.307.503 | 341 | 1.455.555 |
| Skattur av ársúrsliti | 176.827 | 1.662 | 503.625 |
| | **9.160.375** | **7.564** | **10.542.938** |

| | Móðurfelag 2014 kr. | 2013 t.kr. | Konsern 2014 kr. |
|---|---|---|---|
| **22. Broyting í rakstrarpeningi** | | | |
| Broyting í vørugoymslum | 0 | 0 | -3.721.711 |
| Broyting í áogn | 5.074.165 | -6.334 | 6.317.299 |
| Broyting í vøruskuld og aðrari skuld | -7.748.069 | 1.131 | -5.300.953 |
| | **-2.673.904** | **-5.203** | **-2.705.365** |